Lars Emil Johansen:

Vilja hava ræðið á egnum viðurskiftum

–Vit vilja hava ræðið á egnum viðurskiftum.Vit tosa tó ikki um suverenitet, men um eitt slag av víðkaðum sjálvstýri, sigur Lars Emil Johansen, umboð fyri Grønland á Fólkatingi og limur í Norðuratlantsbólkinum

POLITIKKUR/-SAMRØÐÐA

Orð og myndir: Heri á Rógvi

– Eg haldi tað vera sera flott og hugvekjandi, at føroyska samfelagið er komið sær so væl eftir sváru kreppuna. Harafturat er tað hugaligt at síggja eitt føroyskt samfelag, sum hevur ein føroyskan høvuðsstað í allar mátar er føroyskt, tá Grønland í stóran mun kann tykjast danskt útattil

Lars Emil Johansen er ein av teimum kendastu og trúgvastu politikarunum í Grønlandi. Júst nú situr hann á Fólkatingi umboðandi Grønland og Siumut. Hann hevur sitið á Fólkatingi frá 1973 til 1979, og hann hevur eisini verið formaður fyri landsstýrið í Grønlandi í árunum frá 1991 til 1997.

Hann hevur seinastu fýra árini ikki verið aktivur í politikki, har hann hevur verið stjóri í Royal Greenland. Hann fór sjálvboðin úr hesum sessi á nýggjárinum, tá hann avgjørdi at stilla upp til fólkatingsvalið.

Støðan hjá grønlendska vinnulívinum er nógv merkt av, at rækjuprísurin er so mikið lágur, soleiðis at korini ikki eru tey bestu.

Lars Emil Johansen hevur verið á vitjan í Føroyum saman við Kuupik Kleist og Tórbjørn Jacobsen. Bæði Lars Emil og Kuupik hava eitt ynski um víðkað sjálvstýri, har Grønland fær ræðið á egnum viðurskiftum.

Hvussu er støðan í Grønlandi nú. Hvussu er við sjálvstýristilgongdin, og hvussu er stemningurin fyri øktum sjálvstýri í Grønlandi?

– Støðan er tann, at tað fyrrverandi landsstýrið, ið varð skipað millum Siumut (Javnaðarflokkurin) og Inuit Ataqatigiit, setti eina sjálvstýrisnevnd, ið skuldi hyggja nærri at møguleikanum at gera Grønland meira sjálvstøgt innanfyri ríkisfelagsskapin, og teir skulu lata eina frágreiðing inn í summar.

Eftir hetta skulu grønlendskir myndugleikarnir taka støðu til, hvat er rættast at gera í framtíðini, um mann ynskir at eitt stig nærri sjálvstýri.

Tá tú spyrt um stemningin, so eg havi merkt í sambandi við valstríðið til fólkatingsvalið, at fólk hava tikið hetta meira til sín. Eg kenni tað soleiðis, at tað er stórur partur av fólkinum, ið veruliga ynskja sjálvstýri. Eg og Kuupik (Kleist, blðm.) hava hvør í sínum lagi formulerað ein politikk, ið leggur upp til sjálvstýri. Vit tosa tó ikki um suverenitet, men um eitt slag av víðkaðum sjálvstýri – kanska eina víðkan av heimastýrislógini. Eg leggi serliga stóran dent á, at vit ynskja at gera okkum fullkomiliga leys frá Danmark ella vit vísa hatur móti dønum. Vit vilja bert sjálvir sleppa at ráða, hvat hendir í Grønlandi og hvørjar avtalur verða gjørdar um Grønland. Tað er ógvuliga hugstoytt fyri meg, tá eg frætti um, at atomvápn hava verið goymd í Grønlandi, uttan at vit hava vitað nakað um hetta. Vit vilja sjálvir vita, hvat Grønland verður nýtt til. Tað er eisini ógvuliga harmligt fyri meg, at uttanríkisráðharrin kann bjóða Grønland út, uttan at vit vita nakað um tað. Vit hava víst, at vit kunnu gera avtalur sjálvir, og tað vilja vit fegnir haldaáfram við at gera. Vit vilja sjálvir ráða yvir egnum viðurskiftum.

Í Føroyum hevur sitandi landsstýrið roynt fleiri leiðir til at koma nærri sjálvstýri/fullveldi hesi seinastu fýra árini. Hava grønlendskir myndugleikar sett nakra ávísa kós út í kortið?

– Tað kann eg sum so ikki svara uppá, tí eg eri ikki partur av landsstýrinum ella samgonguni í Grønlandi.

Tann sess, ið eg havi á Fólkatingi, vil eg nýta til at økja um møguleikarnar hjá Grønlandi at gerast politiskt sjálvstøgt og við tíðini eisini búskaparliga sjálvstøðug. Eg havi tó varnast, at tað er sera truplult at gera nakað munandi, tá tú stendur einsamallur. Tí havi eg eisini tikið stig til at stovna Norðuratlantsbólkin. Eg skal vera tann fyrsti til at siga, at tað er harmligt, at Lisbeth L. Petersen ikki er við, men eg havi bjóðað henni við og tosað við hana persónliga, men hon ynskti ikki at luttaka. Vit høvdu staðið sterkari fýra, men eg skilji á lagnum upp á fleiri mátar, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ikki riggað so væl saman.

Eg trúgvi øll í Føroyum og Grønlandi eru samd um, at stigvíst at minka um blokkin, men hetta hetta skal sjálvandi gerast forsvarligt.

Tú hevur verið í leiðsluni hjá Royal Greenland, sum eisini hevur nógvar føroyingar á lønarlistanum. Hvussu verður við leiklutinum hjá hesum í framtíðini. Ynskja tit framhaldandi at nýta føroyskar menn á brúnni. Á fundinum sunnukvøldið viðmerkti tú m.a., at tað er ein trupulleiki við dønum í Grønlandi, ið ikki seta seg inn í mál og mentan?

– Sjálvandi hava vit eitt ynski um, at grønlendingar koma at vera á brúnni á grønlendskum skipum. Vit eru tó á ongan hátt ónøgdir við føroyingar. Teir føroyingar, ið sigla við grønlendskum skipum, eru heldur ikki við, tí teir eru føroyingar, men teir duga hatta arbeiðið.

Munurin millum danir og grønlendingar er nógv størri enn munurin millum føroyingar og grønlendingar. Vit líkjast upp á fleiri mátar. Vit hava líknandi mentan, livhátt og matvanar fyri nevna nøkur dømi.

Danir hava ikki víst sama hegnið til at verða integreraðir í Grønlandi sum føroyingar. Tað finnast sjálvandi danir, ið duga grønlendskt og eru væl inni í mentanini, men sum heild eru teir ikki serliga væl inní mentan og máli í Grønlandi.

Eg kundi hugsað mær, at danir vísti meira respekt mótvegis grønlendingum við at seta seg inn í mál og mentan. Vit mugu eisini seta størri krøv, men vit mugu samstundis ásanna, at tað er trupult at læra grønlendskt.

Tú hevur verið fortalari fyri tí sokallaði »Baseøkonomiini«. Kanst tú greiða frá, hvat hetta er fyri nakað?

– Nú hevur mann í nógv ár nýtt pláss í Grønlandi til hernaðar basir. Hetta hevur ganga tann rætta vegin. Tað er ikki á sama hátt »inn« at ganga fullur og at drekka nógv, sum tað var fyrr. Tey ungu hava tikið eitt øðrvísi drekkimynstur til sín, og eg haldi, at støðan er batnað.

Tað er eingin skomm at hava ein rúsdrekkatrupulleika, men tað er ein skomm ikki at gera nakað við tað.

Hvussu upplivir tú tað føroyska samfelagið í dag í mun til áður?

– Eg haldi tað vera sera flott og hugvekjandi, at føroyska samfelagið er komið sær so væl eftir sváru kreppuna. Harafturat er tað hugaligt at síggja eitt føroyskt samfelag, sum hevur ein føroyskan høvuðsstað í allar mátar er føroyskt, tá Grønland í stóran mun kann tykjast danskt útattil.

Tó upplivi eg støðuna í Føroyum soleiðis, at alt verður politiserað, og hetta er óheppið, tá tú ætlar at taka verulig felagstøk. Eg eri tó sera glaður fyri at vera í Føroyum og fegin um framgongdina í føroyska samfelagnum.

Hvussu ávirkar hetta grønlendska samfelagið í dag?

– Flestu trupulleikararnir á tí sosiala økinum skyldast rúsdrekkamistnýtslu. Sjálvur havi eg eisini verið í viðgerð fyri rúsdrekkatrupulleikar, soleiðis at eg ikki drekki meira. Eg haldi, at myndin oftani verður gjørd eitt sindur ov døpur. Tað eru framvegis stórir trupulleikar við rúsdrekkamisnýtslu, men eg meti tað

Lars Emil Johansen nýtti eisini høvið til at hyggja framvið á blaðhúsinum hjá Sosialinum á Argjum

Javnari sjóvarhiti í Nesvík

Norðan fyri alistðina hjá Fiskaaling í Nesvík er gjørt eitt grótkast, sum skal verja pumpurnar, ið pumpa sjógv til alikørini, har kalvin gongur. Endamálið er at flyta pumpurnar longri út á sundið, so javnari sjóvarhiti fæst

FISKAALING

Edvard Joensen

Nýggjur verjugarður er gjørdur norðan fyri alistøðina í Nesvík til at verja pumpurnar, sum pumpa sjógv í alikørini, har kalvin gongur

Mynd: Edvard Joensen

Nesvík: Kalvarnir í alikørunum í Nesvík skulu hava javnari hita í sjónum, teir svimja í. Tað gerst við at leggja pumpurnar longri út á Sundalagið, enn tær framman undan hava ligið.

Eitt grótkast er gjørt norðan fyri alistøðina, sum skal verja pumpurnar, sum pumpa sjógv inn til kalvakørini inni á alistøðini.

Fyrr hevur alistøðin fingið sjógv úr einum brunni, sum gamla alistøðin Føoya Laks, ið átti gomlu støðina í Nesvík, hevði gjørt. Esiini hevur sjógvur verið tikin úr einum av hyljunum, sum eftir vórðu, eftir at byrgingarnar úti á Sundalagnum vóru burturtiknar, sigur Hørdum Wardum, stjóri á Fiskaalaing.

Men tað vóru ávísir vansar ið at taka sjógv haðani, sigur hann. Í fyrsta lagi kundi tað gerast rættiliga tutr í brunninum, tá stór fjøra var. Og eisini gjørdist hitamunurin á sjónum í byrginini alt ov stórur. Tá kalt var í veðrinum, kundi hitin fara væl niður um tað, ráðiliga var, og sama tá heitt var, fór hann upp um tað, tilmælt verður.

Hørdur Wardum sigur, at teir mæla til ein meðalhita upp á eini fýra stig. Og taðkunnu teir fáa við at pumpa sjógv úr sjálvum Sundalagnum.

Kalvin trívist best við hesum meðalhitanum, og hitin skal eisini vera so støðugur, sum gjørligt.

Men tað er ikki bara at leggja pumpurnar út á sundið. Tær skulu eisini verjast, og tí er so verjugarðurin gjørdur norðanfyri.

Hesin verjugarðurin er ikki einasta íløgan, Fiskaaling hevur gjørt í seinastuni. Ein tvíkilja, sum Fiskalaing skal hava, er júst um at vera liðug á Hydrotech á Eiði.

Talan er um ein fóðurbát til alistøðina hjá Fiskaaling úti í Hesti, sigur Hørdur Wardum.

Fiskaaling hevur lívfisk gangandi úti í Hesti at taka til, um eitthvørt skuldi hent lívfiskastøðini í Skopun, greiðir stjórin á Fiskalaing frá.

Tað eru bara tríggjar alistøðir í landinum, sum klekja rogn. Umframt Fiskaaling eru tað Fútaklettur í Vágum og East Salmon á Norðtoftum, sum hava lívfisk. Fiskaaling hevur út móti helvtini av rognaframleiðsluni, sigur Hørdur Wardum.

Borðoyarnes skal fiska krabba

Borðoyarnes skal ætlandi fiska krabba undir Føroyum. Alfa Seafood í Fuglafirði, sum ger Borðoyarnes út, hevur søkt Fiskimálastýrið um loyvi, men bíðar eftir svari

KRABBAVEIÐA

Edvard Joensen

Borðoyarnes liggur á Fuglafirði og bíðar eftir avgreiðsluni í Fiskimálastýrinum, sum skal gera av, um skipið sleppur at fiska krabba undir Føroyum ella ikki

Mynd: Edvard Joensen

Fuglafirði: Borðoyarnes liggur í løtuni á Fuglafirði klárur at fara undir Føroyar at fiska krabba. Skipið er væl útgjørt til hesa veiðu, men reiðaríið bíðar eftir loyvi frá Fiskimálastýrinum.

Jón Nolsøe Olsen, reiðari, sigur, at teir hava brúkt Borðoyarnes til krabbaveiður undir Grønlandi fyri einum tveimum árum síðan. Tá var gjørd ein eitt ára avtala við grønlendingar, men tá hon gekk út, var hon ikki longd. Tí kom Borðoyarnes heimaftur, sigur hann.

Nú er so ætlanin at fara at royna undir Føroyum í fyrsta umfari. Verður tað ov lítið, ætla teir at fjakka eitt sindur. Suður á Hatton Bank og heilt yvir á Flemish Cap hava teir ætlanir um at royna, sigur hann.

Royndir eftir krabbba undir Føroyum eru ikki tær stóru, sigur Jón Nolsøe Olsen. Eitt grønlendskt skip gjørdi nakrar royndir fyri einum tveimum árum síðan, men tær eru ikki nóg gott grundarlag til at ger nakrar metingar eftir, heldur hann, tí tað viðraði so ómetaliga illa, meðan teir vóru her, at ilt er at siga, hvussu veruligi standurin er hjá krabbanum undir Føroyum út frá teimum royndunum.

Borðoyarnes er sera væl útgjørdur til hesa veiðuna, og alt verður liðugt viðgjørt umborð.

Tá krabbin er fingin, veður skelin loyst frá og blakað burtur. Síðan er herðablaðið við beinum og klóm eftir, greiðir reiðarin frá. Tað verður reinsað væl, skilt í flokkar eftir stødd og pakkað í stálbakkar. Krabbin verður so kókaður í hesum bakkunum, áðrenn hann verður lagdur í mettaðan laka og frystur fyri síðan at enda at verða pakkaður í útflutningspakningin.

Krabbin, sum fiskaður verður undir Føroyum, er ikki tann sami, sum teir fingu undir Grønlandi, sigur reiðarin á Borðoyarnesi. Undir Grønlandi fiskaðu teir ein arctiskan krabba, sum góður prísur var fyri. Hann varð seldur til Japan og Marnaðin.

Undir Føroyum er tað taskukrabbi, teir vænta at fáa, og eitt sindur longri suðuri eitt slag, sum á enskum verður nevnt Deep Sea Red Crab. Hvussu prísurin er á hesum sløgum, dugir hann ikki at siga. Heldur ikki veit hann reiðiliga marknaðin, men sigur, at ein japani, teir hava samband við, er sinnaður at selja veiðuna í Japan og í Europa.